BØNARLØTAN

JANUAR 2024 39. árg.

Hann legði í munn mín nýggjan song. Sl. 40.4

1. Nýggjársdagur *5. Mós. 1.1-21*

NTM - FØROYAR
Noomi og Eli Christiansen
Hadassa 13, Tabita 10, Debora 8, Natan 5
Ungdómsráðstevnan Reach verður 22-24. mars í Onglandi. Vit senda eitt toymi avstað. Tilmelding áðrenn fríggjadag 11. jan. Meiri kunning á www.ntm.fo.

Nýggjársmøtir í Buli
Møtir í Buli á Signabø 6-7. jan., leygarkv. kl. 20 og sunnukv. kl. 19. Sangur: Kvartettin í Betesda og Manskórið í Ebenezer. Talarar: Poul Færø, Eyðfinn Reyðberg, John Færø og Jákup N. Olsen.

KRINGVARPIÐ
21. og 28. jan. andakt, Johann J. Petersen

EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)
Sunnukv. kl. 21.....Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.....Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

2. Týsdagur — *Matt. 1.1-17*

DANMARK, Kristnastova
Sólva og Jákup Hansen

Susan og Øssur Berghamar
Skarin, ið hevur savnast í Kristnastovu hetta seinasta árið, hevur verið størri enn vanligt, og tað er gleðiligt. Sum farið er inn í eitt nýtt ár, vóna vit, at góði áhugin heldur fram, og at Harrin eisini signar, leiðir og gevur ávøkst. Takk, at tit framvegis minnast verkið og okkum við. berghamar@kristnastova.dk

3. Mikudagur — *5. Mós. 1.22-45*

USA, New Tribes Mission, Alabama
Judy og Óli á Grømma Jacobsen
Vit vitja á Filipsoyggjum fram til 18. jan.

ZAREPTA

4. Hósdagur — *Sálm. 119. 1-22*

USA, North Carolina
Charlotte, Calvary Church
Gudny og John Munro
Takk, at tit mintust okkum í bønum tykkara í des. Møtini og kon-

sertirnar gingu betur enn væntað; Harrin eigur æruna. Biðið fyri teimum, sum hoyrdu boðskapin, at tey koma til trúgv.

FØROYAR
– Else og Poul Johan Djurhuus
– Anna Maria og Rógvi Joensen
– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9
– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 12
– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 3

5. Fríggjadagur — *Matt. 1.18-25*

ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn
Rósa og Jógvan Purkhús
Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn
Relativisma merkir allan vesturheimin, eisini Ísland. Børn og ung læra, at alt er relativt, og at eingin avgjørdur sannleiki er. Bið, at tey síggja, at Jesus er sannleikin og einasti vegurin til Faðirin.

6. Leygardagur — *5. Mós. 2.1-15*

DANMARK, Hirtshals, Malta
Ansa og Arnold Mortensen
Ewelina 13

Anna og Hans Djurhuus
Vit takka fyri forbøn í farna ári og ynskja øllum Harrans signing í nýggja árinum. Føroyskt møti verður í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsg. 2A, Aalborg, leygard. 6. jan. kl. 19. Vit verða í Føroyum stóran part av jan. og nakað út í feb., og tá ber til at hitta okkum á tel. +45 40438166.

7. Sunnudagur *Matt. 2.1-12*

OM, LOGOS HOPE, TeenStreet
Heidi Jacobsen fer við Logos Hope í jan. á STEP-programm í tríggjar mán. Alice og Jaspur Tausen fara saman við børnunum Jóna og Kaleb við Logos Hope í tríggjar mán., har Jaspur verður maskinmaður. Skipið fer úr Maputo, Mosambik, til Suðurafrika í jan, har tað vitjar ymiskar býir í 5 mán. Biðið fyri teimum. Vit takka fyri farna árið og gleða okkum til 2024.

8. Mánadagur *5. Mós. 2.16-37*

FØROYAR
Shamila og Høgni Johannesen
Biðið fyri STEVN, sum byrjar í januar. Sjúka og eftirsjúka hevur darvað arbeiðið eftir ferðina í Pakistan. Vit fara helst nýggja ferð til Pakistan fyrra hálvár í 2024. Biðið um vísdóm at taka næsta stigið.

9. Týsdagur *Matt 2.13-23*

OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope
Tanja og Kurt Abrahams
Hanna 0
Nýtt skúlaár í Suðurafrika byrjar í jan. Vit vænta nýggjar toymislimir á miðstøðini í Mamelodi. Nýggj børn byrja í frítíðarskúlanum. Biðið fyri toyminum og leiðsluni, um góða manning, einleika, og at endamálið er greitt fyri okkum øll.

10. Mikudagur — *5. Mós 3.1-14*

SENEGAL, Dakar
Marion og Hans Arni Jensen
Ryan 14
10-27. jan. luttekur Marion á skeiði uttan fyri Dakar um mál og mentan. 21-31. jan. verða fundir á høvuðsstøðini í Dakar um leiðslu. Biðið, at Harrin leiðir.

*Í dag fyllir Joy Tuohy 7 ár

11. Hósdagur — *Sálm. 119.23-46*

ONGLAND, European Christian Mission
Dorit og Simon Marshall
Vit takka Harranum fyri varðveitslu, signingar og fyri hansara fólk, sum stuðla okkum andaliga og fíggjarliga. 11-22. jan. verða vit í Ukraina, har vit vitja, stuðla og eggja ECM-trúboðarum í Lviv og Irpin, nærhendis Kyiv, og hava fundir við ECM-leiðsluna í Ukraina.

12. Fríggjadagur — *Matt. 3.1-17*

DANMARK, Kolding
Jan og Anne Zachariassen
Takk fyri forbønir og stuðul. Arbeiðið við Jóh. ev. heldur fram. Biðið, at vit fáa neyðuga hjálp og góðkenningar, ið okkum tørvar.

ONGLAND, Birmingham, OM
Claire og Craig Niclasen
Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13

13. Leygardagur — *5. Mós. 3.15-29*

GRØNLAND, Qaqortoq
Marjun og Páll Poulsen

Hjúnini Bebiane og René Hesikiassen mistu bæði páparnar á ferðini, har tey vitjaðu í Føroyum. Teir doyðu sama dag og vórðu jarðaðir í senn. Biðið fyri teimum syrgjandi.

GRØNLAND
Juvel II
Gull-Britt og Karsten Hansen

14. Sunnudagur — *Matt. 4.1-11*

DANMARK, Odense
Árni Helmsdal

Biðið, at vit røkka út til nakrar av teim rættiliga mongu føroyingunum á Fyn.

GRØNLAND, Nuuk
Naalakkap Jiisusip Oqaluffa
Hans Sivertsen

GRØNLAND, Qasigiannguit
Solveig og Daniel Kinda

15. Mánadagur — *5. Mós. 4.1-24*

PAPUA NÝGUNEA
Lili og Brian Poulsen
Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3, Olivia 0

Dagurin nærkast, tá vit flyta inn í ein ættarbólk, ið tørvar gleðiboðskapin. Brian hevur hjálpt til at byggja eina íbúð á hjálpar-

miðstøðini, har trúboðarafamiljur kunnu halda til, tá tær eru á veg út aftur á markina. Biðið, at arbeiðið verður liðugt í hesum mánaðinum. Takk fyri bønir tykkara. Harrin hevur verið trúfastur, og vit eru takksom at vera partur av hesum stóra verki.

PAPUA NÝGUINEA, Mengen
Annika og Simon Flanagan
Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6

FØROYAR
– Elin og Jógvan Jacobsen
– Unn og Jógvan Zachariassen
– Lis Zachariassen
– Annika og Poul Færø
– Anna og Óli Steinberg
– Maria og Jens Bech

16. Týsdagur *Matt. 4.12-25*

PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
Carol og Poul Joensen
Poul vitjar samkomuna í Sorimi á Filipsoyggjum 16. jan. - 11. feb. Biðið fyri ferðini, at vitjanin gongur væl, og at hann fær rættlisið alt tilfarið úr Nýggja Testamenti sum ætlað.

FØROYAR
Birgit og Svenning av Lofti
Atlantic Mission, Juvel II
Vit skipa fyri evangeliseringsferð við Juvel II til Randers um páskirnar 2024. Biðið, at vit fáa manning, og at ungfólk tekna seg at koma við! Meir kunning hjá Ruth Gaardlykke, tel. 519090.

– Rutt og John í Skemmuni
– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi
– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 15, Terji 11, Petra 10

*Í dag fyllir Hadassa Christiansen 13 ár

17. Mikudagur — *5. Mós. 4.25-49*

ÍRLAND, Global Serve International
Guðrun og Ivor Tutty
Vit eru Harranum takksom fyri signing og ávøkst Hansara í undanfarna ári. Guðrun byrjaði at arbeiða í nov. Vit takka serliga fyri forbønir og gleða okkum til árið, ið nú byrjar.

18. Hósdagur — *Sálm. 119.47-69*



ITALIA, Molise
Heidi og Regin Guttesen
Trisha 11, Emma 7
Biðið fyri La Fonte samkomuni, sum vit byrja eitt nýtt ár, at Harrin skal styrkja, menna og unna okkum vøkstur.

SVEIS, Versoix, Redeemer Grace
Jeanette og Solomon Magura
Reuben 10, Micah 10

19. Fríggjadagur — *Matt. 5.1-16*

DANMARK
Glostrup Frikirke
Beinta og Kristian Guttesen hava í mong ár trúføst tikið ábyrgd í samkomuni.

Ikki minst hevur Kristian verið og er framhaldandi virkin í Orðsins tænastu. Kristian fylti 60 ár í nov. Tey eiga døturnar Rebekku, 20 ár, og Saru, 18 ár.

USA, Nebraska, Ethnos 360
Rachel og Peter Hansen

TURKALAND, Istanbul (f)
Annika og Stephen Everett

20. Leygardagur — *5. Mós. 5.1-16*

INDONESIA
Krissy og Daniel Hansen
Zephaniah 3, Selah Rose 0
Biðið um vísdóm, nú vit fyrireika farloyvi í 5 mánaðir og koma til Føroya í mars. Vit eru næstan liðug við indonesiska mál- og mentanarskeiðið. Vit ætla at ættleiða tvey børn úr Liberia, og fyrireikingarnar til ættleiðingartilgongdina eru lidnar.

21. Sunnudagur — *Matt. 5.17-32*

FRANKARÍKI, Nantes, OM
Cecile og Jóhannis Mortensen
Sarah 13, Leah 10, Abigail 5
Vit eru spent at síggja, hvat Gud hevur til okkara í nýggja árinum. Í dagligu tænastuni vitjar Jóhannis samkomur og fólk, ið tæna í Frankaríki. Hann fer til Føroya og Danmarkar um páskirnar ella fyrr. Biðið Harran signa ferðina.

22. Mánadagur *5. Mós. 5.17-33*

DANMARK, Skovlunde
Sara og Andrew Berghamar
Noah 17, Lydia 6
Vit takka fyri samfelagsbond og forbøn í 2023 og kenna okkum signað at hava so gott føroyskt bakland. Fleiri millum okkara eru rakt av bæði sjúku, tunglyndi og eru eisini ávirkað av støðuni í Ísrael. Biðið, at vit byrja 2024 væl og megna at vísa á friðin og vónina, sum bert Jesus gevur.

TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360
Wina og Benjamin Hansen
Noah Elias 12

23. Týsdagur *Matt. 5.33-48*

FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa
Cathy og Jógvan J. Rasmussen
Vit verða heima til í mars. Stóri parturin av ráðgevingararbeiðnum er samskiftið umvegis telduna.

24. Mikudagur *5. Mós. 6.1-25*

MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
Inga McKendry
Takk fyri bønir tykkara í 2023, sum eru svaraðar á mangan hátt. Biðið fyri okkum, nú vit gera nøkur av smærru brøvunum klár til upptøku og endurskoða aðrar bøkur, sum vit týddu fyri nøkrum árum síðani.

25. Hósdagur — *Sálm. 119.70-92*

SENEGAL, Tongia
Lív Poulsen
1. Mós. og Dán. eru nú prentað og býtt út. Ein av lærarunum í størsta trúarbólkinum her í bygdini hevur spentur bíðað eftir 1. Mós. Hann lesur alt av Skriftini, sum er prentað, og hevur nógvar spurningar um ymiskt. Biðið, at Harrin dregur hann til sín. Biðið eisini fyri eldri manni, sum lesur nógv í Skriftini. Hann er verfaðir unga umsetaran.

26. Fríggjadagur — *Matt. 6.1-15*

MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro
Hansy og Martin Tuohy
Victoria 17, Emma Grace 16, Jónatan 14, Markus 11, Evita 8, Joy 7
Hjúnini Don Gerardo og Doña Maru vórðu doypt í des. Tey eru um 60 ára aldur og hava eina buldruta bakgrund, men av Guds náði byrjaði Gerardo at søkja Harran, og síðani eisini konan, tá hon sá broytingina í manninum. Biðið, at teirra vitnisburður eggjar stóru familjuni at søkja Harran.

27. Leygardagur — *5. Mós. 7.1-26*

PAPUA NÝGUINEA, Kovol
Natalie og Philip Hansen
Louis 6, Timon 4
Biðið fyri okkum, nú vit fara til Týsklands at bíða, til tvíburarnir verða føddir og fyri, at vit verða før fyri at enda greiningina av kovolmálinum, meðan vit eru har.

VENESUELA, Puerto Ordaz
Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

28. Sunnudagur — *Matt. 6.16-34*

FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM
Liz og Ragnar Niclasen
Vit vóru tvær vikur inni í bygdini saman við teimum trimum, sum eg arbeiði saman við. Tað var uppbyggjandi at gjøgnumganga tilfarið til Rómbr. í felag. Tíverri datt Liz og hevur nú nógva pínu í beininum. Biðið, at hon skjótt verður frísk, so at vit sleppa aftur norður til bygdina at gjøgnumganga tilfarið til Rómbr.

FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)
Monika og Tim Sharp
Hanna 15

*Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 16 ár

29. Mánadagur — *5. Mós. 8.1-20*

ONGLAND, Cornwall
Anna og David Rodda
Henda mánaðin eru 50 ár síðani eg fór úr Føroyum á bíbliuskúla í USA. Í flogfarinum varð mær greitt, at eg skuldi líta á Gud eina til at útvega tað, mær tørvaði til lívsins uppihald. Nú 50 ár seinni – tvey ár undantikin, tá ið eg arbeiddi á fiskavirki – er tað júst tað, sum Hann hevur gjørt. Hann hevur eisini stuðlað mær gjøgnum 24 ár við parkinson, og framhaldandi er Harrin trúfastur og heldur mær uppi á so mangan hátt við sínari umsorgan.

TEILAND, Chiang Mai
Corine og Sørin Joensen
Aron 11, Noah Kristian 10

30. Týsdagur — *Matt. 7.1-14*

Elam Ministries, Evropa
Margretha Højgaard Poulsen
Jólatiltakið í Athen eydnaðist sera væl. Nógv luttóku – serliga nógv børn. Eg var ikki sjálv við, men Hamid og Corrie, sum leiða arbeiði okkara í Grikkalandi, lata heilsa og takka fyri forbøn. Nú fyrireika vit tiltøk í Týsklandi í vár og fyrsta skeiðið á netinum í 2024, sum byrjar 1. feb.

JAPAN
Shino og Hallur Mortensen
Kano 14, Nana 12, Louie 10, Rio 4
Biðið fyri okkara sunnudagsskúla. Vit royna at finna nýggjar leiðir og at menna arbeiðið.

*Í dag fyllir Petra í Prestgarði 10 ár
*Í dag fyllir Tabita Christiansen 10 ár

Útgevari	KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd	Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla	Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting	Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn	info@grafikmaster.fo
Prent	Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur	prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða	www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

BATSEBA (2016)

204 síður 200 kr.



Batseba var unga, vakra kona hermannin Uria. Tá ið Dávid kongur eitt kvøldið sá hana baða sær, hugtók hon hann, og hann sendi boð eftir henni. Og Batseba varð við barn. Kongurin royndi fyrst at fjala skommina, men gjørdi síðan av at senda Uria í deyðan og taka Batsebu til konu. Batseba varð vanærd, men Gud signaði hana, og hon gjørdist ættmóðir til egna son Guds. Francine Rivers dugir væl at liva seg inn í og at lýsa bæði persónar og umstøður.

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo